gult cyan magenta svart

Nevndirnar í Runavík

B‡rá›i› í Runavík hevur skipa› seg vi› Rodmundi Nielsen í formanssessinum. Tær fimm nevndirnar eru eisini mann-a›ar vi› trimum limum í hvørjari nevnd

RUNAVÍKAR B†RÁ‹
Stefan í Skorini

Av misgávum komu nakrir av nevndarlimunum skeivt fyri, tá vit skriva›u um nevndirnar í sí›stu viku. Tí taka vit afturí aftur nøvnini í nevndunum í Runavíkar b‡rá›i.

Rodmundur Nielsen fekk flestar persónligar atkvøur, og hann ver›ur b‡rá›sforma›ur, me›an Hans Petur Ellingsgaard ver›ur næstforma›ur.

B‡rá›sforma›urin er altí› forma›ur í fíggjarnevndini, og afturat sær hevur hann Sæunn Ólavsdóttir Hansen og Ragnar S. Olsen. Eykalimirnir eru Hans Petur Ellingsgaard og Marja Lamhauge.

Í teknisku nevnd sita Hans Jacob Lamhauge, forma›ur, Regin Olsen og Kári P. Højgaard.

Havnanevndina manna Kári P. Højgaard, sum er forma›ur, Hans Tausen Olsen og Marja Lamhauge.

Marja Lamhauge er forma›ur í sosialu nevnd og afturat sær hevur hon Sæunn Ólavsdótti Hansen og Hans Tausen Olsen.

Í mentanarnevndini sita Hans Petur Ellingsgaard, forma›ur, Ragnar S. Olsen og Regin Olsen.

Umframt at b‡rá›slimirnir sita í nevndum b‡rá›sins, eru teir eisini limir í ymsum st‡rum.

Ungdómar kjakast um politikk



Nólsoyar bygd ver›ur um vikuskifti› karmur um ungdómspolitiska rá›stevnu og almennan fund um Føroyar í 2020

Um vikuskifti› skipar Føroya Ungdómsrá› fyri politiskari rá›stevnu úti í Nólsoy. Fimm ungmannafeløg ver›a umbo› a› á fundinum, og f‡ra høvu›sevni ver›a umrødd á rá›stevnuni, sum ver›ur alt vikuskifti ›

POLITISKUR FUNDUR
Stefan í Skorini

Hóast kommunuvali› er fari› afturum bak, er framvegis møguleiki at fara á politiskan fund og rá›stevnu. Ta› er FUR saman vi› politisku ungmannafeløgunum, sum skipar fyri ungdómspolitiskari rá›stevnu og almennum fundi úti í Nólsoy. Rá›stevnan er fyri limir í politisku ungmannafeløgunum, men øll hava møguleika at koma á almenna fundin í skúlanum.

Fríggjakvøldi› hevur Edvard Joensen, bla›ma›ur, fyrilestur um politiska ideologi og at halda seg til eina stevnuskrá. Sí›ani ver›ur or›askifti millum luttakararnar.

Leygardagin ver›ur kjakast um nøkur brei› politisk evni, sum eru frammí í dagsins politiska kjaki. Lagt ver›ur til brots kl. 9, tá evni› ver›ur flóttafólkapolitikkur, og ta› ver›ur Ungmannafelagi› Samband, sum leggur fyri.

Næsta evni› ver›ur oljuvinnan, og tá leggur Sosialistiskt Ungmannafelag fyri. Tri›ja evni› ver›ur um privatiseringar, tá Fólkafloksungdómur leggur fyri. Fjór›a og seinasta evni› ver›ur Føroyar í alheimssamfelagnum, og leggur Unga Tjó›veldi› fyri. Or›askifti ver›ur um hvørt evni.

Leygarkvøldi› ver›ur almennur fundur í Nólsoyar skúla, har evni› ver›ur okkara samfelag 2020. Or›st‡rari ver›ur Edvard Joensen, og øll eru vælkomin at luttaka á fundinum. Til ber at fara vi› Rituni úr Havn kl. 15 leygardagin, og møguleiki ver›ur at gista í skúlanum og fáa bæ›i náttura og morgunmat fyri 100 krónur.

ÁLMANAKKIN 2001

- ein bílig og viðkomandi jólagáva -

Í samfull 73 ár hevur Álmanakkin á so mangan hátt verið álitið hjá fólki á sjógvi og landi úti um heima. Haðani hevur tú altíð fingið svar uppá spurningar um eitt nú dagar og mánaðar, sól og mána, skip, bátar og streym.

Álmanakkin 2001 inniheldur umframt alt tað vanliga, nýteknaði streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.

Bókin er prýdd við litum og er 320 blaðsíður. Enn sum áður er Álmanakkin ein bílig bók. Óinnbundin kostar hann einans 125 krónur, meðan innbundna útgávan kostar 175 krónur.

Streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.

Pf. H.N. Jacobsens Bókahandil
Tel +298 31 10 36 · P.O. box 55 · FO-110 Tórshavn
e-mail: hnj-book@post.olivant.fo

Jólagávur í Badmintonhøllini

Sjúr›ur Poulsen og Jórun Vang vi› nøkrum av lutunum, sum vóru vi› til jólasøluna fyri tveimum árum sí›ani

JÓLASØLA
Jan Müller

Stóra árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag stendur nú aftur fyri durum. Leygardagin og sunnudagin standa dyrnar í Badmintonhøllini opnar fyri øllum teimum, sum vilja ogna sær sjálvum ella lata ø›rum í jólagávu ein av teimum vøkru og snotuligu lutunum, sum limirnir í Heimavirkisfelagnum kring alt landi› hava gjørt.

Hesafer› ver›a ikki færri enn 34 ymiskir básar í høllini. Talan er mest um bundnar lutir, men har er eisini mangt anna› so sum lutir evna›ir úr træ, har eru jóladekoratiónir og annars alt, sum hugsast kann vera vi› til at gera jólini hugnaligari og til gle›i fyri øll.

Opi› er leygardagin frá klokkan 10 til 20 og sunnudagin frá klokkan 14 til 19. Leygardagin klokkan 14 og sunnudagin klokkan 16 spæla ung frá Tórshavnar Musikskúla uppá trompet. Møguleiki er bá›ar dagarnar at keypa kaffi, te, køkur og smurt brey›.

Jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag plagar at ver›a sera væl vitja› og skilur bla›i›, at ta› ræ›ur um at skunda sær, vil man ogna sær ein av teimum mongu heimagjørdu lutunum.

Mótmælisval í Mikladals kommunu:

Tri › ja hvør var atkvø›a blank

Eingin av Trøllanesi stilla›i upp á kommunuvalinum hesafer› , og nógv fólk í bygdini atkvøddu blankt, tí misnøgd er vi› vi›urskiftini í kommununi

KOMMUNUVAL
Ey›un Klakstein

Í n‡ggja bygdará›num í Mikladals kommunu sita bara fólk úr Mikladal. Eingin av Trøllanesi stilla›i upp á valinum hesafer›

Ta› vóru óvanliga nógvar blankar atkvø›ur í Mikladals kommunu á kommunuvalinum í sí›stu viku.

Fólk á Trøllanesi og í Mikladali velja limirnar í Mikladals kommunu, og tri›ja hvør atkvø›a, sum tey sleptu ni›ur í atkvø›ukassan, var blank.

Orsøkin til hetta er, at ta› er stór misnøgd á Trøllanesi vi› vi›urskiftini í kommununi, og uttan at nakar kann siga ta› vi› vissu, eru ivaleyst flestu av teimum blanku atkvø›unum komnar frá fólki á Trøllanesi.

Forma›urin í valst‡rinum í kommununi er Jógvan Joensen av Trøllanesi.

– Vit kunnu sjálvandi ikki vita, hvat fólk hava atkvøtt, men ta› eru uttan iva nógv fólk á Trøllanesi, sum hava atkvøtt blankt, heldur hann.

Eingin av Trøllanesi stilla›i upp

51 fólk høvdu valrætt á valinum hesafer›, og av teimum eru 12 fólk á Trøllanesi. 46 fólk vóru á vali, og av teimum atkvøddu 15 blankt.

– Ta› er óvanligt, at so nógvar blankar atkvø›ur eru í Mikladals kommunu. Men orsøkin til ta› er helst, at ta› er misnøgd vi› ymisk vi›urskift, sigur Jógvan Joensen, forma›ur í valst‡rinum og fyrrverandi bygdará›slimur.

Ein listi var til kommunuvali› hesafer›, og ta› vóru bara fólk í Mikladali, sum stilla›u upp.

Vanligt hevur veri›, at bæ›i fólk úr Mikladali og av Trøllanesi hava veri› á listunum, sum hava veri› gjørdir til kommunuvali›. Men hesafer› gjørdu fólk í Mikladali sín egna lista uttan fólk av Trøllanesi.

Kanska er orsøkin til ta›, at á seinasta valinum fingu fólk á Trøllanesi meirilutan í bygdará›num.

Listin hjá teimum í Mikladali gjørdi, at fólk á Trøllanesi kendu seg sett til sí›is, og tey høvdu ikki hug at gera sín egna lista til vali›. Og ta› er helst eisini orsøkin til, at so nógvar blankar atkvø›ur vóru á valinum.

Strí› um skúlan

Misnøgd er eisini millum fólk á Trøllanesi, tí skúlin á Trøllanesi ikki ver›ur brúktur. Bygdará›i› avgjørdi seint í áttatiárunum, at øll børnini í kommununi skuldu ganga í skúlanum í Mikladali.

Í løtuni eru seks børn úr hvørjari bygd í skúlaaldri, og eftir summarfrítí›ina ver›ur eitt fleiri á Trøllanesi. Tí halda fólk í bygdini, at skúlin á Trøllanesi eisini átti at veri› brúktur.

– Eitt ta› seinasta fráfarandi bygdará› gjørdi var at samtykkja, at skúlin skuldi takast í n‡tslu aftur. Men spurningurin er, um tann avger›in ver›ur gjøgnumførd, sigur Jógvan Joensen, sum er ein av teimum, sum nú fer frá.

Saman vi› Jógvani Joensen sótu eisini Anja Eliasen og Bár›ur Østerø av Trøllanesi í fráfarandi bygdará›num

Vi›urskiftini eru broytt

Umframt máli› um skúlan á Trøllanesi, er misnøgd eisini um onnur vi›urskifti hjá kommununi.

Millum anna› um eitt lán upp á eina millión krónur, sum var› tiki› í áttatiárunum, og sum hevur kosta› kommununi nógvar pengar í rentum.

– Ta› plagdi at ver›a gó› vi›urskifti millum bygdirnar, men eftir at beint var› fyri skúlanum á Trøllanesi, hevur misnøgd veri› millum fólk, sigur Jógvan Joensen.

– Ta› er spell, at bá›ir skúlarnir ikki ver› brúktir, tí ta› gera tey í hini kommununi í oynni, sigur hann.

Í n‡ggja bygdará›num í Mikladals kommunu sita Markus S. í Nor›nástovu, Christian Andreasen og Sigrun Heldarskar›.

Kommunuval í Kalsoynni

Tvær kommunur eru í Kalsoynni – Mikladals kommuna og Húsa kommuna.

Til Mikladals kommunu hoyra bygdirnar Mikladalur og Trøllanes, me›an hinar bá›ar bygdirnar í oynni – Húsar og Sy›radalur – manna Húsa kommunu.

Á kommunuvalinum hesafer› høvdu 51 fólk vælrætt í Mikladals kommunu, og í Húsa kommunu høvdu 37 fólk valrætt.

Fimm fólk hava siti› í bygdará›unum í oynni, men nú er tal minka› ni›ur í tr‡ fólk.

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Citroën Berlingo 2,0HDi
Nú við tveimum skjótihurðum

og við einum 2,0HDi motori á 90 hk

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820

OPIÐ HÚS
LEYGARDAGIN 2/11
VIÐ HOPPI-BORG FYRI BØRNINI
AT STUTTLEIKA SÆR Í
GÓÐ BIL TIL-BOÐ
EISINI BJÓÐA VIT TE/KAFFI
KØKUR OG SAFT
VÆLKOMIN

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820